# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð

**At tíðarhvørnin melur minnir Ebba Mortensen sáli okkum um í frálíku yrking síni. Vit, ið nú eru komin upp í árini, vita eisini at hon melur ógvuliga skjótt. Lívið er virðismikið, og í Halgubók stendur, at fyri lív sítt gevur maður alt hann eigur. Tað er so ymiskt sum lív menniskjans verður lagað, summi koma upp í høgan aldur, meðan onnur harafturímóti fara í besta aldri. Men eitt er vist: Tað er hin Alvaldi ið gevur og tekur lív, og sjálvsagt boyggja vit okkum í virðing fyri honum.**

### Kaj Vilhelm Meyer

Kaj Vilhelm Meyer var føddur á Tvøroyri 7. mars 1929. Sum smádrongur misti hann pápan ið sló út vestanfyri Mykines.

14 ára gamal fór hann til skips. Sjólívið dámdi honum væl, og 10 ár seinni fór hann á skiparaskúla. Í Havnini nam hann sær ikki bert kunnleika, men har fann hann eisini hana, ið var honum ein trúføst kona ígjøgnum alt lívið Poula Oluffa. Tey giftust í oktober mánað 1951 og settu búgv á Tvøroyri.

Sjómanslívið var lív hansara, og var hann við fiskiskipi bæði við Føroyar, í Íslandi og í Grønlandi. Í 1965 fór hann í danska handilsflotan, har hann var í 20 ár fram til 1984.

Kaj var við, tá teir byrjaðu bilstøðina Bil á Tvøroyri, og mong okkara minnast at hann koyrdi lastbil har í fleiri ár eisini.

Børnini eru trý: Herfríð, ið býr í Froðba, Vilhelm, ið býr í Trongisvági, og Katrin, ið býr í Keypmannahavn. Abbabørnini eru átta og fýra langabbabørn.

Nú Kaj er farin, minnast vit hjúnini aftur á góðar og ríkar løtur í heimi teirra. Har hava vit mangan sitið væl. Hóast avstandurin var langur millum Tvøroyri og Oslo, so høvdu vit ofta samband við hvønn annan, og tað hendi fleiri ferðir at hann vitjaði okkum.

Kaj hevði áhuga fyri ítrótti, og sjálvsagt lá fótbóltsliðið TB honum nær at hjarta. Hann var ein íðin kirkjugangari, og tað seinnu tíðina vitjaði hann javnan samkomuna Vitnið í Hvalba.

Vit drýpa høvur í takksemi. Gud vælsigni minnið eftir okkara kæra Kaj. Gud vælsigni alla familjuna.

### Brynhild Chr. Wasa

Brynhild Chr.Wasa var fødd í Havnini 24. juni 1916. Foreldrini vóru Anna og Vilhelm Tórs-heim.

20 ára gomul fór hon at arbeiða á Reinsarínum í Tórsgøtu, samstundis sum hon nýtti frítíð sína at hjálpa til í Frelsunarherinum.

Nevnast skal serstakliga, at tá skótaarbeiðið byrjaði í juli mánað í 1939, var hon fyrsti skótaleiðarin saman við Poulu Olsen.

Í 1945 segði hon upp starv sítt í Tórsgøtu og fór á offisersskúla Frelsunarhersins í London.

Síðani bar leiðin til Íslands, har hon byrjaði at arbeiða í samkomu Frelsunarhersins á Ísafirði.

Hon var saman við Immu og Oskari Jónssyni. Ein ungur norskur offiserur var nýliga komin at hjálpa til, navn hansara var Olaf Wasa. Tað gekk ikki lang tíð, so rann saman teirra millum, og 28. oktober 1947 giftust tey í Havnini, og vikuna aftaná fluttu tey til Vágs og stovnaðu samkomuna har 9. november.

Tíverri gjørdist Olaf sjúkur av tuberklum eftir nøkur ár, og hann var lagdur inn á sanatorium í Noregi. Tá hann var frískur aftur, hildu tey áfram í mong ár sum samkomuleiðarar í Frelsunarherinum. Tá samkoman í Vági hevði 50 ára hátíðarhald í 1997, vóru hjúnini og vitjaðu aftur har og mintust aftur á gamlar dagar.

Brynhild hevur búð í nógv ár í Tønsberg, men í 1998 flutti hon til Sketsmo uttanfyri Lillestrøm, har hon var ein trúfastur soldátur í samkomuni. Tey síðstu árini var heilsan ikki góð, og vit vitjaðu hana javnan, og tað var altíð hugnaligt at støkka inn á gólvið hjá henni. Hóast aldurin var høgur, so var minnið sera klárt heilt til hon doyði.

Fyri okkum var tað altíð hugnaligt at vera saman við henni, og nú hon er farin inn í ævinleikan, ynskja vit at Harrin skal skal signa minnið og tey ið eftir sita.

### Erik Lund Eriksen



Erik Lund Eriksen var føddur í Århus 20. november 1944. Sum 12 ára gamal kom hann til Føroyar, tí pápi hansara, Hugo Eriksen, hevði fingið starvið sum stjóri í Balslevs Timburhandli.

Í 1964 fór familjan aftur til Danmarkar, men Erik var eftir, tí hann var farin á skiparaskúla, har hann tók skiparaprógv í 1965.

Í 1966 giftist hann við Gunnvør, døttur til Ingeborg og Sverra Djurhuus. Tey settu búgv í Tórshavn og fingu børnini Høgna, Maiken og Sverra. Abbabørnini eru 7.

Erik var sjómaður og sigldi sum stýrimaður, og seinastu nógvu árini sum skipari við donskum handilsskipum. Sum sjómaður upplivdi hann nógv. Hann var tvær ferðir við í skipsbroti. Fyrstu ferð var, tá ið Blikur fórst í Grønlandi, tá var hann bara 17 ár, og fyri nøkrum árum síðani, tá hann sigldi í Miðalhavinum við donskum skipi. Seinnu árini var hann við skipum hjá P/F Thor í Hósvík.

Fyri 1½ ári síðani gjørdist hann sjúkur, men kom rímiliga væl fyri seg, men hann mátti tó gevast at sigla. Tað nívdi hann óivað, tí alskurin lá til sjógvin.

Í heiminum í Bóndabrekku 12 hevur ein mangan sitið væl og notið gestablídni.

Síðst ein vitjaði heima, hittu vit hann í miðbýnum. Eitt hugnaligt prát fingu vit, og serstakliga minnast vit at Erik tosaði um trúgv sína á Harran.

Tað var við Guds hjálp, at hann var komin ígjøgnum, nú sjúkan var har, og hann segði at framtíðina hevði hann lagt í Harrans sterku hendur.

1. mai tók Harrin hann til dýrd sína. Vit biðja um at Jesus skal vera hjá tykkum ið syrgja og sakna. Friður verið við minni hansara.

**Erna og Njál**

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Ingrid Mikkelsen** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi í Vágs kirkju hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Ingrid, kunnu lata Vágs kirkju eina peningagávu, konta í peningastovninum.

**Ingrid Joensen, fødd Anthoniussen í Froðba,** andaðist 23. juni á Landssjúkrahúsinum, 86 ára gomul. Farið verður frá kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi og í Tvøroyrar kirkju fríggjadagin 26. juni kl. 17. Jarðarferðin verður sunnudagin 28. juni kl. 13. Tey ið vilja minnast Ingrid, kunnu lata Tvøroyrar kirkju eina peningagávu konta í peningastovnunum.

**Argrim Johansen,** ættaður úr Miðvági andaðist í Keypmannahavn 22. juni, 76 ára gamal.

---

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma og omma okkara

**Ingrid Mikkelsen**
Vágur

andaðist mánadagin 22. juni, 72 ára gomul.
Kistan fer úr Kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi suður í Vágs kirkju tórsdagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju fríggjadagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Eileen, Ingun og Unn**

Tey, ið ynskja at minnast Ingrid, kunnu lata eina peningagávu til Vágs kirkju, konta í peningastovnunum.

---

### 103 ára føðingardagur

Leygardagin 27. juni verður Jacob V. Hansen á Glyvrum 103 ár. Tey, ið ynskja at heilsa upp á Jacob, eru vælkomin á Ellis- og røktarheimið í Runavík eftir kl. 15.00.

**Dagurin**

**24. juni. Jóansøka.** Føðingardagur Jóhannes Doyparans. Minningardagurin hjá halgimennum var vanliga deyðadagur teirra, men hjá Johannes Doyparanum er tað føðingardagurin, ið verður hildin, av tí at hann var heilagur longu í móðurlívi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Sosialurin -har tað hendir